sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Postbox 3279,
Tinghúsvegur 7
110 Tórshavn

Dagfesting: 5. januar 2026
Journal nr.: 21/23465-29
Viðgjørt: hh

Hoyringsvar frá Sernámi til dagstovnalógina des 2025

Hoyringssvar til: Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt

Sernám metir tað gleðiligt, at ynski er um eitt greiðari býti millum land og kommunur – og at strembað verður eftir at tryggja øllum Føroya børnum javnbjóðis treytir og tænastur. Eins og tað stendur orðað í viðmerkingunum til uppskotið um broytingar í dagstovnalógini, so er av alstórum týdningi, at markamótini verða gjørd týðiligari. Tí er neyðugt nærri at nágreina 1) Hvør eigur hvørjar skyldur, og 2) Hvar gongur markið millum kommunur og land. Sama í mun til tær námsfrøðiligu ráðgevingarnar, ið broytingarnar í dagstovnalógini leggja upp til at stovnseta. Ynski um námsfrøðiligar tænastur kring alt landið er eitt ávegis átak á einari rættari kós. Men man kann eisini loyva sær at seta spurnatekin við, um til ber at tryggja javnbjóðis tænastustøði til øll børn, tá man samstundis skipar ymiskar – og ymiskrættaðar – ráðgevingar kring landið. Heldur eigur at verða hugsað í einari einfaldari loysn.

Til § 3. *Kommunan* **kann** *geva børnum, sum búgva í kommuuni, tilboð um pláss.....*
Skuldi hetta ikki verið eitt skal?

Til §3 stk 2. her vera dagrøktir og dagstovnar javnstilla sum námsfrøðiligt tilboð, her er ikki somu fakligu krøv í verandi dagrøktum sum dagstovnum. Sí annars viðmerking til **1.2 Galdandi lóggáva**

Til § 5 a. '*Kommunurnar skulu sjálvar ella í samstarvi við aðrar kommunur veita námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar. Ráðgevingin fevnir um námsfrøðiliga vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum og tryggja trivnað og menning hjá børnum. Stk. 2. Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn ið hava serligan ella samansettan tørv.'*
Eitt av aðalmálunum í Barnaverkætlanini er at gera skipanirnar einfaldari, og at talan skal vera um eina hurð. Ein einfaldari inngongd til hjálp og vegleiðing. Sernám metir tað ikki einfalt, hvørki fyri familjur ella dagstovnar, um tað gerast uppaftur fleiri hurðar at fyrihalda seg til. Í dag hava vit í Føroyum longu alt ov nógvar dyr, ógreið markamót og dupultfunktiónir millum ymsar geirar. Tað verður tí mett óskynsamt við fleiri. Harafturat metir Sernám tað ivasamt, um ásetingarnar í nýggju lógini koma at gera markamótini millum land og kommunur nóg greið. So leingi tað eru nógvar hurðar, líka so leingi verður ógreitt, hvør eigur hvørja ábyrgd. Hetta hevur søgan víst okkum ferð eftir ferð.

Heldur eigur at hugsast, 1) Hvar til ber at gera tingini einfaldari, og at 2) Leggja tænastur og dupultfunktiónir saman. Her eru virksemið hjá námsfrøðiligu ráðgevingunum og sernámsfrøðiligu tænasturnar hjá Sernámi nærliggjandi at hugsa inn. Á sama hátt sum eitt álit, ið júst er handað Landsstýrismanninum í Barna- og Útbúgvingarmálaráðnum, hevur mælt til at samantvinna virksemið hjá Námi, Undirvísingarstýrinum og UVS. Sernám vil tí mæla til, at man eisini her hugsar í samantvinnan av virksemi. Og at kommunurnar saman við landinum koma at gjalda inn í ein felags kassa umvegis einum nærri ásettum býtislykli fyri at víðka virksemið. Tað mátti verið nærliggjandi fyri tænastustøðið at hugsað virksemið inn í ein samlaðan stovn, sum framyvir kann veita tænastu til øll Føroya børn, heldur enn at seta smáar námsfrøðiligar ráðgevingar á stovn í øllum landsins kommunum. Á henda hátt ber til at skipa ein stóran, vælvirkandi og landsfevnandi stovn, ið varar av øllum børnum frá 0-18 ár, bæði hvat námsfrøðiligum- og sernámsfrøðiligum tænastum viðvíkur. Er tørvur á ábøtum, so skulu tær gerast á einum stað, heldur enn fleiri. Hetta vildi verið støðan við námsfrøðiligu ráðgevingunum.

Afturat hesum vita vit frá royndunum við teim eksisterandi námsfrøðiligu ráðgevingunum, at markamótini í dag eru ógreið og ódefinerað. Og dagstovnarnir seta orð á, at teir hava ilt við at finna útav, nær teir skulu heita á hvørja tænastu. Tí verður tað ofta tilvildarligt. Tað verður als ikki mett nóg mikið við '*nátúrligum ábendingum um, hvar markamótini liggja*'. Hesi mugu sum minimum konkretiserast týðiliga – øllum pørtum at frama.

Umframt skal hugsast inn, um vit við nógvum smáum kommualum eindum fær gjørt arbeiðið nóg dygdargott, tá hugsað verður um at fáa røttu starvsfólkini at manna størvini. Kring landið hava fleiri kommunu gjørt sernámsfrøðiligar stovur, tað kann her eisini vera trupult at síggja, hvør hevur ráðgevingina til hesar serstovur.

Stk 3. *Landstýrissfólkið ásetur við kunngerð nærri reglur um samskipan millum námsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 1 og sernámsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 2, herundir reglur um upplýsingargongd og samstarv."* Hendan kunngerðin **má** vera klár samstundis sum dagførda dagstovnalógin kemur í gildi. Tað er alneyðugt, at greiður skilnaður er millum kommunalu- og landsuppgávuna. Børn mugu ikki gerast kastibløkur millum kommunur og land, tí tørvurin verður defineraður ymiskt. Tað er heldur ikki til barnsins besta, at processirnar gerast longri enn neyðugt.

Til viðmerkingarnar 1.2. Galdandi lóggáva
Kommunurnar mugu eisini hava sín serkunnleika á námsfrøðiliga økinum. Tað má framganga tíðiligari, hvat tiltøkini hjá kommununum skulu umfata og hvønn serkunnleika námsfrøðiligu ráðgevingarnar skulu hava.

- *dagrøkt: ansing í heimi dagrøktara ella í spælistovu, í mesta lagi fimm børn.* Her verður dagrøkt nevnt sum ansing og ikki sum eitt námsfrøðiligt tilboð

Til viðmerkingarnar 1.3. Endamálið við uppskotinum
Uppskotið tekur støði í trimum kjarnuspurningum, sum eru grundleggjandi fyri eina vælskipaða og framtíðarrættaða lóg:

1. *hvussu ábyrgdarbýtið millum land og kommunur skal skipast,*
2. *hvørji tilboð og aldursbólkar lógin skal fevna um, og* okkurt má gerast meria týðiligt viðvíkjandi forskúlum ella um børn ganga í barnagarði til 1. flokk.

3. *hvussu námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving skal skipast.*
4. Tað má eisini snúgva seg um, at veita eina javnbjóðis tænastu kring alt landið og at tænastan ikki skal vera tengd at hvar í Føroyum man býr

Tá fakøkini av sernámsfrøðiligu tænastunum, so er ógreitt, hvør skal veita hesa, og verða nakrar tænastur nevndar, tó ikki allar, sum Sernám í verandi løtu, sum er greitt frá í viðmerkingunum til serligar tænastur.

Tó kann her viðmerkjast, at í verandi løtu snýr sernámsfrøðiliga økið seg í minni mun um útgreiningar, kanningar, metingar og serligum tvørfakligum tiltøkum, men í størstan mun um ráðgeving og konsultativum tilgongdum. Spurningur kann tí setast um tað er meiningin, at sernámsfrøðiliga økið í størri mun skal taka sær av útgreiningum, kanningum, metingum og tvørfakligum tiltøkum, tá henda lóg kemur í gildi?

Til Viðmerkingar til 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotunum

Til viðmerkingarnar 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur... '*Sernám røkir longu sernámsfrøðiliga ráðgeving fyri dagstovnaøkið sambært verandi praksis og hevur fakliga orku og skipanir til tess. Eingin eyka útreiðsla verður tí væntað av Sernámi.'*

Tað er rætt, at Sernám í dag veitir sernámsfrøðiligar tænastur fyri dagstovnaøkið. Faktum er eisini, at útreiðslurnar seinnu árini eru hækkaðar meira enn sjálv játtanin. Hetta hevur úrslitað í, at Sernám er minkað við o.u. 5 ársverkum seinastu fáu árini. Orkan hjá stovninum er tí minkandi. Skal eitt nøktandi tænastustøðið framhaldandi tryggjast – innan bæði dagstovna- og fólkaskúlaøkið, so er neyðugt við munandi játtanarhækkan.

Tað kann leggjast afturat, at tað á Sernámi í dag eru 7 sálarfrøðingar (6,6 ársverk), ið veita tænastur innan dagstovna- og fólkaskúlaøkið. Danska psykologlógin, sálarfrøðingarnir til nú hava virkað eftir, verður niðurløgd 31.12.25. Sálarfrøðingarnir koma fram yvir – saman við m.a. læknum, tannlæknum og sjúkrarøktarfrøðingum – at virka undir autorisatiónslógini. Henda setur hægri krøv til bæði fakligheitina og dokumentatión av virksemi. Tørvur er tí hjá stovninum at nágreina nærri, hvat hesar broytingar koma at merkja í praksis – eisini við atliti til virksemið hjá sálarfrøðingunum framyvir.

Í sama brotið undir *landið*, verður víst til, at Nám fær eykajáttan fyri at taka sær av yvirskipaðu námsfrøðiligu ráðgevingini, men ongastaðni víst til, hvør hevur yvirskipaðu sernámsfrøðiligu ráðgevingina. Hetta sum viðmerkt í øðrum broti, so hjálpir hetta ikki til at hava greidleika millum land og kommunu.

Serligar viðmerkingar til § 5 a, stk. 1-3
Her vera nevndar ymisk dømi um sernámsfrøðliga ráðgeving. Her skal fyrst viðmerkjast, at ikki ber til at seta motoriskar og málsligar kanningar saman í einum, hetta er heilt hvør sítt økið.
Her eru fleiri øki, sum kunnu leggjast afturat, tá farið verður at nevna nøkur so ítøkiliga, men her koma vit so við nøkrum dømum:

- ASK, sum stendur fyri Alternativ Supplerende Kommunikation

- Umframt motoriskar kanningar, so gera ergo- og fysioterapeutarnir eisini m.a. eygleiðingar, ráðgeva og vegleiða starvsfólkum og foreldrum, søkja um hjálpartól til fjølbrek og lættari brek

Annað. Í viðmerkingunum stendur, at sernámsfrøðiliga tænastan m.a. skal fevna um: '*greiningar ella ávísingar til psykiatri ella serlig tilboð*'. Hetta er ikki satt. Sernám hevur síðani á vári 2021 ikki gjørt ávísingar til Barna- og Ungdómspsykiatri. Kommunulæknarnir hava einsamallir havt ábyrgdina av ávísingum til útgreinan. Hetta er sostatt ikki ein røtt lýsing av veittu tænastunum.

Tað verður víst til Sernám í einkultum setningum, men tað er ikki so týðuligt, nær og hvat uppgávan hjá Sernámi er. Tað kann vera torført at lesa um meint verður við Sernám, tá skrivað verður sernámsfrøðilig tænasta.

Vinarliga

Vegna Sernám

Harriet Hansen
Varastjóri